# Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya

**Faroe Hotels and Restaurants' Association**

Løgtingsskrivstovan
Postboks 208
FO-110 Tórshavn

Att.: Fíggjarnevndin & Vinnunevndin

Tórshavn 7. november 2008

Okkara tilv./Our ref.:
/L-gtin-GMF-B-V
Tykkara tilv./Your ref.:

*Rætting til fyrrsenda skriv d.d. frá Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya*

## Viðmerkingar til Ll 33/2008 um at seta partapening í Smyril Line

Gistingarhús og Matstovufelagið hevur fylgjandi viðmerkingar til lógaruppskotið um at seta partapening í P/F Smyril-Line.

Felagið vil undirstrika, at tað er av alstórum týdningi fyri vinnuna at hava eina slíka farleið, sum er bygd upp gjøgnum síðstu nógvu árini.

Felagið heitur á Løgtingið, at farleiðin ikki dettur niður fyri, og vit koma at standa uttan sjóðvegis samband við útheimin. Tað er sera umráðandi, at vit ikki minka um ferðafólkatalið, og at vit skulu minnast til, at ferðavinnan er ein vinna, har útlendingurin leggur pening eftir til landið.

Smyril Line hevur nú avgjørt at broyta ferðaætlanina soleiðis, at Noreg og Skotland verða tikin úr ferðaætlanini. Vit harmast um, at man tekur destinatiónir av ferðaætlanini, sum hava verið undir uppbygging í fleiri ár, við til at fáa ferðafólk hendavegin, og vónandi verða ruturnar tiknar upp aftur seinni.

Setur Løgtingið pening í P/F Smyril Line, so fegnast vit um, at ferðaætlanin verður broytt soleiðis, at silgt verður til Danmark tvær ferðir um vikuna, og gevur hettar sostatt ein betur regularitet til meginlandið. Vit vita eisini, at nógv tann størsti parturin av ferðafólkunum koma úr ella via Danmark.

Tað, sum hóast alt er mest avgerðandi fyri okkum er, at fleiri ferðafólk koma til landið, tí vit hava stóran hotelkapacitet tøkan eisini um summarið.

Vinarlig heilsan

Ása Johnsdóttir, forkvinna
Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo